Løgmaður:

# Ikki sannførdur um ES-limaskap

**– Eg eri ikki sannførdur um limaskap í ES, men ein limaskapur í EFTA hevði latið dyrnar upp fyri Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**



*Hvønn veg skulu Føroyar fara? Fullan ES-limaskap? EBS-líknandi sáttmála? EFTA? Møguleikarnir eru nógvir*

Mynd: Jens Kr. Vang

ES OG FØROYAR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Spurningurin um Føroyar og umheimin er ein trupul spurningur. Flestu politikarar eru samdir um, at núverandi støða er ikki nøktandi. Hvat skulu vit gera?

Møguleikarnir eru fleiri í tali. Føroyar kunnu fáa fullan limaskap í ES gjøgnum Danmark, júst sum Áland hevur tað gjøgnum Finnland. Føroyar kunnu royna at fáa ein EBS-líknandi sáttmála við ES, júst sum Ísland hevur tað við ES. Føroyar kunnu gerast limir í EFTA, og tann vegin koma tættari at fríum marknaðum og ES. Føroyar kunnu gerast fullveldisríki, og gerast limir í ES. Ella kunnu Føroyar velja onki at gera, sum eisini er eitt val, ið Óli Samró áður hevur víst á.

### Ikki nøktandi støða

Løgmaður er greiður yvir, at kjakið um Evropeiska Samveldið er trupult. Hann ásannar, at núverandi støða hjá Føroyum er ikki nøktandi.

– ES-ráðstevnan legði upp til at fáa Føroyar lýstar í einum ES-samanhangi. Tað var fyri at fáa eina hóming av, hvørjar møguleikar vit hava. Í løtuni er støðan hon, at vit hava eina handilsavtalu við ES, sum bara snýr seg um vørur. Tað er ikki nøktandi, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

### Limaskapur í EFTA áhugaverdur

– EFTA er framvegis ein sera dynamiskur felagsskapur, sum víðkar sítt virksemi allatíðina. Ein limaskapur í EFTA hevði latið dyrnar upp fyri Føroyum. Tú fært atgongd til so øgiliga nógv. Eitt EFTA-samstarv er avgjørt ein møguleiki við hesi nýggju lóggavuni, sum samgongan hevur fingið ígjøgnum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum leggur afturat, at gjøgnum EFTA avreiða vit ikki fiskivinnuna.

– Tað eru summi, sum hava ført fram, at missa føroyingar ræðið á fiskivinnuni, so missa vit okkara identitet, sigur løgmaður.

### Ikki sannførdur um ES

– Eg eri ikki sannførdur um limaskap í ES. Men núverandi støða er ikki góð nokk. ES-limaskapur kann sjálvandi geva okkum veldigar fyrimunur, inklusiv tey fýra frælsini. Men trupulleikin er framvegis tann, at vit skulu avgeva fiskivinnuøkið. Í hesum sambandi er tað vert at dyrka, at Føroyar saman við Noregi og Íslandi ger felags front ímóti ES, sigur Jóannes Eidesgaard.

Óli Samró hevur ført fram, at um Føroyar, Ísland, og Noreg ganga saman um fiskivinnupolitikkin og seta nøkur krøv fram, so má ES finna eina semju við hesi trý londini, og so kann okkurt røkjast fyri, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES verður broyttur.

### Í hesum valskeiðnum

– Eg vóni, at vit í hesum valskeiðnum fáa ES-spurningin munandi meira greiddan og klárlagdan. Politikarar eru meira greiðir yvir, at isolering ber ikki til. Tað er semja ímillum samgonguflokkarnar, at núverandi støða er ikki góð nokk, og tað er í sjálvum sær eitt gott útgangspunkt til at finna eina politiska semju í ES-málinum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

> ” *Mann hevur ongantíð í Føroyum kjakast um, havt tað hevði merkt, um mann fór upp í fiskivinnupolitikkin hjá ES.*
> – Jóannes Eidesgaard

> ” *Kjartan Jóhannson segði á ráðstevnuni um ES, at EBS-avtalan hevur havt ótrúliga ávirkan á íslendskan búskap.*
> – Jóannes Eidesgaard

> ” *Kjakið um ES er ungt, og tað eru sera fáir aktørar í kjakinum. Vit mugu breiðka um kjakið.*
> – Jóannes Eidesgaard

# EBS-sáttmálin er hornasteinurin

**Kjartan Jóhannsson, sum helt fyrilestur á ráðstevnuni um ES, sigur, at limaskapurin í EBS var tað størsta stigið á leiðini hjá Íslandi at gagnnýta teir møguleikarnar, sum altjóðagerðin hevur við sær**



*– Hvørt okkurt líknandi kann fáa støðufesti í Føroyum, tað vita vit ikki enn, men míni ráð til føroyingar er at taka ímóti framtíðini við opnum ørmum og einum opnum perspektivi, sigur Kjartan Jóhannsson, sendiharri hjá Íslandi í Brússel*

Mynd: Jens Kr. Vang

ÍSLANDS-MODELLIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– EBS hevur víst seg at vera grundarlagið undan ógvusligu búskaparligu menningini hjá Íslandi. Hinvegin eri eg vísur í, at eingin av okkum dugdi at síggja veruligu avleiðingarnar áratígggjur seinni, sigur Kjartan Jóhannsson, íslendskur sendiharri í Brússel.

EBS-sáttmálin er tann einasta altjóða sáttmálin, sum ES hevur gjørt, ið gevur triðjaparts londum beinleiðis atgongd til innara marknaðin hjá ES. Kjartan Jóhannsson sigur, at EBS-sáttmálin veitir vissu fyri, at Ísland fær beinleiðis og fulla atgongd til innara marknaðin hjá ES. Kapitalur, tænastur, og fólk kunnu flytast ótarnað millum Ísland og limalond í ES.

EBS-sáttmálin er dynamiskur á tann hátt, at tá nýggjar ES-lógir verða smíðaðar, so verður EBS-sáttmálin javnan dagførdur til at fevna um hesar eisini. Kjartan Jóhannsson sigur, at hugburðurin landanna millum hevur verið at sleppa undan orrustum og finna loysnir ístaðin.

– Vit hava havt góðar royndir við EBS. Tað hevur verið so gott, at tað sær út til, at vit í Íslandi hava eina breiða politiska semju um, at EBS-sáttmálin er hornasteinurin í okkara samstarvi við ES, sigur Kjartan Jóhannsson.

– Okkara búskapur er vorðin nógv sterkari og fjølbroyttari. Búskaparvøksturin er hækkaður munandi. Vit hava fingið eitt nýtt og nógv meira modernað samfelag. Íslendskir vinnulívsmenn hyggja meira úteftir, og við alsamt størri sjálvsálitið hava teir stovnað fyritøkur í øðrum londum, sigur Kjartan Jóhannsson, sendiharri hjá Íslandi í Brússel.

> ” *Tað sum vit hava gjørt í Íslandi er eyðsýniliga tað, at vit hava brúkt okkara sjálvræði til at taka avgerðir til okkara egna búskaparliga fyrimun, men vit hava eisini gagnnýtt marknaðarkreftirnar og flutt avgerðirnar frá stjórnini til borgararnar, og harvið økt teirra frælsi.*
> - Kjartan Jóhannsson